# Tráðleyst alnet í Klaksvík

**Fyritøkan TeleTech hevur í hyggju at geva klaksvíkingum møguleikan til at fáa tráðleyst internetsamband. Longu fyrst í komandi árið fara dáta at flúga gjøgnum luftina í Klaksvík**

KT
*Heri á Rógvi*



*Í Klaksvík ætla menn at nýta tráðleyst internetsamband*

Einaferð var ætlanin at leggja stóran part av Klaksvíkini undir glas. Tað var tann sonevnda ostaklokkan, sum skuldi gera tað størri og meira at vera íbúgvi í Klaksvík. Henda ætlanin varð tó ongantíð til veruleika, men klaksvíkingar kunnu nú fegnast um at fáa okkurt floymandi omanfyri høvdini á teimum.

Eins og vit hava sæð í høvuðsstaðnum og í Eysturoynni, eins í øðrum londum, so hava einamest virki, men eisini privatfólk fingið møguleikan at fáa sær sokallað tráðleyst internetsamband. Og tað er eisin tráðleyst í orðsins rætta týdningi.

### Á Brúnaskarði

– Í løtuni arbeiða menn hja TeleTech á Brúnaskarði við at seta upp antennu, so virkir í Klaksvík við skjótum og tráðleysum Interneti, kunnu hava sama møguleika, sum virkir í Eysturoy og í Havn hava haft síðan ár 2000, skrivar TeleTech í tíðindaskrivi.

TeleTech hevur sett sær fyri at verða klárir at veita tráðleyst internetsamband í januar/februar mánað komandi ár.

Antennan, sum verður sett upp til endamálið, er eftir øllum at døma síðsta skríggj innan øki. Samband er knýtt beinleiðis til Føroya Tele í Havn. Av Brúnaskarði verður hetta so sent víðari út til klaksvíkingar.

Fyri at kunna taka ímóti hesum, so krevst serlig útgerð til endamálið. Talan er um eina antennu, sum tekur ímóti dáta, umframt káplar. Av TeleTech verður upplýst, at kostnaðurin fyri hesa útgerð til ein privatan kunda fer at liggja um 4.000 kr.

TeleTech sigur, at teir bæði fara at leggja seg eftir vinnulívinum og privatum viðskiftafólki.

Talan er um fast internetsamband, har goldið verður fyri stovnan (útgerð) og mánaðargjald. Harumframt kemur eisini eitt gjald fyri hvørt megabeitið, ið tú móttekur. Sum nú er, so liggur prísurin hjá TeleTech á hvørjum megabeitið um 1,25 kr, men hetta er eitt sindur ymiskt. Tað eru serligir prísir galdandi, um tað eru tveir á netinum hjá TeleTech, sum samskifta.

### Órættvíst

Ein annar, sum eisini hevur verið frammi við tankanum um tráðleyst internetsamband í Klaksvík, er Esbern Hansen frá Hansoft. Hann hevur ført fram, at tað er rættiliga nógv dýrari at gera tílíkt í Klaksvík enn eitt nú í Havn, tí her verður ein meirkostnaður álagdur.

Esbern Hansen sigur seg framvegis arbeiða við einari verkætlan, har endamálið er at bjóða tráðleyst internetsamband í Klaksvík, men hetta letur fyribils bíða eftir sær.

Esbern Hansen sigur tað vera sera órættvíst, at teir í Klaksvík noyðast at skulu gjalda meira fyri at fáa eina linju til Havnar, soleiðis at tað verður ein stór íløga hjá teimum at skipa tráðleyst internetsamband í Klaksvík.

# Skjótari og dýrari

*Tað kann vera gerast rættiliga dýrt at downloada, hóast hetta tekur stutta tíð*




**Fleiri virkir og einstaklingar í Føroyum nýta fast internetsamband, men skjótari ferðin verður, tess størri verður eisini rokningin. Orsøkin til prísirnar er, at kapasiteturin ikki er nóg stórur**

KT
*Heri á Rógvi*

Tað eru umleið 8.500 internet felagar í Føroyum, sambært hagtølunum hjá Fjarskiftiseftirlitinum. Av hesum eru tað bert góðir 250, sum hava fast samband við internetið/alnetið, t.e. tú er online allatíðina.

Tey, sum hava fast internetsamband hava oftani eisini eitt sera skjótt samband, har tað gongur við teirri rúkandi ferð. Tey, ið nýta vanligt uppringt samband ella ISDN samband klára ikki í nærhendis so skjótt at taka niður av alnetinum ella annað virksemi í hesum sambandi.

### Eitt MB, ein króna

Hjá nógv tí størsta partinum av teimum, sum hava fast internetsamband, er talan um eina gjaldsskipan, har goldið verður eitt mánaðargjald, eitt stovningargjald og eitt gjald fyri hvørt megabeit, ið verður download(a), t.e. taka niður av netinum.

Hetta merkir so, at tekur tú eitt nú ímóti einum e-maili, sum fyllir 5 megabeit, so kann hetta taka eina heilt lítla løtu at taka ímóti, men tú mást gjalda einar fimm krónur fyri hetta, alt eftir hvat fyri hald tú hevur.

Við øðrum orðum ber tað so til siga, at skjótari internetsamband oftani kann merkja nógv dýrari rokning.

Tey flestu vilja mestir gera sær dælt av tí skjóta sambandinum og fara undir at taka meira og meira niður, tí hetta gongur ógvuliga skjótt fyri seg.

Eftir hvat Sosialurin skilir, so er orsøkin tann, at kapasiteturin er so mikið avmarkaður úr Føroyum á alnetinum, at hetta er ásett. Aðrastaðni síggja vit sokallað flatrail gjald, har ein føst upphædd verður goldin, men hetta setur tó framvegis sínar avmarkingar.

Tað er tó einki, sum forðar fyri hesum í lóggávuni.



*Nógv eru farin at nýta tráðleyst internetsamband í Føroyum*



# Stýrisskipanarlógin er brotin

**Tað er brot á Stýrisskipanarlógina at útgjalda lønir uttan lógarheimild, sigur løgtingsmaður. Tingmaðurin tvætlar, svarar landsstýrismaðurin við fíggjarmálum**

EYKAJÁTTAN
*Edvard Joensen*



*Vilhelm Johannesen, fíggjarnevndarlimur, átalar harðliga, at Karsten Hansen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, rindar pengar út uttan játtan. Tað er brot á Stýrisskipanarlógina, sigur Vilhelm Johannesen*

Uppskotið um eykajáttanarlóg fyri november 2001 varð lagt fram so seint, at ivasamt er, um tað fær gildi, áðrenn tað fer úr gildi aftur, sigur Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður.

Hatta er tvætl, svarar Karsten Hansen landsstýrismaður við fíggjarmálum, sum hevur lagt uppskotið fyri Løgtingið. Vilhelm Johannesen veit betri, enn hann letst, og vil bara spæla hund.

Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður, vísir á, at eftir tingskipanini kann uppskotið um eykajáttanarlóg, eftir sum tað varð lagt fram, í fyrsta lagi verða samtykt leygardagin 22. december. So er spurningurin, um tingformaðurin fer at kalla tingið saman leygardagin fyri jól.

Um so er, ella um frávik verður givið, soleiðis at tað verður avgreitt áðrenn, kann tað góðkennast í landsstýrinum og síðan lýsast í Kunngerðarblaðnum, sum helst verður leygardagin 29. december.

Vanligt er so, at lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er samtykt. Tað vil siga sunnudagin 30. december. Eftir er so mánadagurin 31. december, sum landsstýrismaðurin so hevur til at avgreiða allar tær útgjaldingar, sum gerast skulu. Hetta tí, at eykajáttanarlógin er bara galdandi í tí fíggjarári, hon er gjørd. Tað vil siga, at hon fer úr gildi, samstundis sum fíggjarárið endar 31. december.

### Heimildarloysi

Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður, metir, at landsstýrismaðurin við fíggjarmálum hevur brotið Stýrisskipanarlógina og arbeitt í heimildarloysi, tá hann hevur goldið lønir úr landskassanum, uttan at játtan er givin av Løgtinginum.

Vilhelm Johannesen vísir á, at talan er um at gjalda út tær lønarhækkingar, sum komnar eru í samband við sáttmálasamráðingarnar, sum hava verið í ár. Tað vil siga eftir, at verandi fíggjarlóg varð samtykt.

Eitt nú vóru sáttmálar undirskrivaðir í vár, og kundi landstýrismaðurin longu tá lagt fyri tingið uppskot um eykajáttanarlóg. Men tað gjørdi hann ikki, vísir Vilhelm Johannesen á. Síðan var møguleikin á ólavsøku, men har kom heldur einki tá.

Ikki fyrr enn nú, árið er farið, kemur uppskotið frá landsstýrismanninum, sigur Vilhelm Johannesen. Men nú hevur landsstýrismaðurin alla hesa tíðina goldið út í stríð við Stýrisskipanarlógina sum sigur, at: »Eingin útreiðsla má verða goldin, uttan at heimild er fyri henni í teirri fíggjarlóg, ella aðrari játtanarlóg, ið er í gildi, tá ið ávíst verður.«

Sum minniluti í Fíggjarnevndini átalar Vilhelm Johannesen harðliga hesa mannagongd og spyr, um Løgtingið kann lata slíkt ganga, ella um nevin nú verður sligin í borðið, og tingið letur hetta fáa avleiðingar fyri landsstýrismannin.



*Karsten Hansen svarar at Vilhelm Johannesen tvætlar og spælir hund*

### Tvætl

Karsten Hansen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, vísir atfinningunum frá Vilhelmi Johannesen aftur sum tvætl og spæl fyri galleríinum.

– Vilhelm Johannesen liggur bara og saboterar arbeiðið, vit royna at gera fyri at byggja hetta landið upp, sigur hann.

Hann heldur uppá, at hendan viðmerkingin er tann sama, sum Vilhelm Johannesen eisini hevði, tá eykajáttanarlógin kom í fjør.

Um tað, sum Vilhelm Johannesen sigur um heimildarloysi, sigur Karsten Hansen, at hann er tann fyrsti landsstýrismaðurin, sum yvirhøvur kemur í Løgtingið við slíkum útreiðslum. Fyrr hava tær bara verið avgreiddar, tí tað er mest praktiskt at gera tað so. Eisini í ár hava lønarhækkingar verið útgoldnar av praktiskum orsøkum.

Tann seinasti sáttmálin er ikki gjørdur fyrr enn nú fyri heilt stuttum, og altenativið hevði annars verið at latið fólk gingið við ongari lønarhækking, til tingið einaferð kom saman aftur.

Men tað veit Vilhelm Johannesen alt um, vísir Karsten Hansen á, og tekur uppaftur, at Vilhelm bara spælir hund.

– Avgerðin um at gera tað soleiðis og samla alt upp í eini seinastu eykajáttanarlóg nú, er langt síðan avtalað í samgonguni, og einki óvanligt er í hesum, sigur landsstýrismaðurin við fíggjarmálum.

